# Elfelagið SEV

## Byggiroknskapur fyri  5 vindmyllur Eystnes og Vørðan

**Avrit**

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið v. m. | 3 |
| Leiðsluátekning | 4 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 5 - 6 |
| Byggiroknskapur | 7 - 8 |
| Nýttur roknskaparháttur | 9 |

# Upplýsingar um felagið v.m.

## Felagið

Elfelagið SEV
Landavegur 92
FO-100 Tórshavn
Telefon: 346800
Telefax: 346801
Heimasíða: www.sev.fo

## Leiðsla

Hákun Djurhuus, stjóri
Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisitingina

## Grannskoðan

**JANUAR**
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

# Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram byggiroknskap fyri vindmyllurnar á Neshaga. Talan er um 3 vindmyllur á Eystnesi, og 2 vindmyllur á økinum Vørðan. Byggiroknskapurin umfatar kostnaðin í sambandi við byggingina, og er uppgjørdur pr. 2. apríl 2014.

Tað er okkara fatan, at byggiroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av íløgukostnaðinum pr. 2. apríl 2014 fyri vindmyllurnar.

Tórshavn, tann 4. apríl 2014

**Stjórn**

Hákun Djurhuus
Stjóri

**Fíggjarleiðsla**

Bogi Bendtsen
deildarstjóri fyri fyrisitingina

# Til SEV

## Váttan á byggiroknskapin

Vit hava grannskoðað hjálagda byggiroknskap fyri 5 vindmyllur í Neshaga, sum inniheldur kostnaðin fyri byggingina av hesum vindmyllum fram til 2. apríl 2014. Byggiroknskapurin vísur ein íløgukostnað uppá 50.006.086 kr., og er gjørdur av leiðsluni samsvarandi nýttum roknskaparhátti.

**Ábyrgd leiðslunnar av byggiroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein byggiroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttan roknskaparhátt. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metur skal til fyri at byggiroknskapurin kann gerast, uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um byggiroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og harafturat eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini, og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í byggiroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í byggiroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í byggiroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein byggiroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu byggiroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at byggiroknskapurin pr. 2. apríl 2014 gevur eina rættvísandi mynd av íløgukostnaðinum fyri tær 5 vindmyllurnar samsvarandi nýttum roknskaparhátti.

**Supplerandi upplýsingar viðvíkjandi nýttum roknskaparhátti**

Uttan at hetta ávirkar niðurstøðuna, vísa vit á upplýsingarnar í byrjanini í hesi váttan, har tað framgongur, at byggiroknskapurin pr. 2. apríl 2014 fyri vindmyllurnar, er gjørdur í samsvar við nýttan roknskaparhátt. Vit hava ikki kannað, um verkætlanin eftirfylgjandi er ella verður dýrkað.

Byggiroknskapurin hevur til endamáls at vísa kostnaðin fyri tær 5 vindmyllurnar, og kann tí vera óegnaður til onnur endamál.

Vísandi til viðmerkingarnar í partinum "Alment um innrokning og máting" í nýttum roknskaparhátti og viðmerkingarnar niðast á síðu 7 viðvíkjandi vindmyllunum við Vørðan, skulu vit vísa á, at byggiroknskapurin ikki tekur við kostnað og møguligt endurgjald í samband við niðurtøku av eldri vindmyllum á økinum.

Tórshavn, tann 4. apríl 2014

**JANUAR**

Løggilt grannskoðanarvirki P/F

Jørmann Petersen

Statsaut. revisor

# Býttur á økir:

| | Eystnes<br>*3 myllur* | Vørðan<br>*2 myllur* | Tilsamans<br>*5 myllur* |
|---|---|---|---|
| Enercon vindmyllur | 21.415.279 | 15.218.632 | 36.633.911 |
| Anlegg | 7.319.790 | 2.293.271 | 9.613.061 |
| Íbinding | 1.228.890 | 586.388 | 1.815.278 |
| Annar kostnaður | 154.142 | 66.157 | 220.299 |
| Renta | 634.174 | 240.907 | 875.081 |
| Dýrkandi viðurskifti | 848.455 | - | 848.455 |
| **Tilsamans** | **31.600.730** | **18.405.355** | **50.006.086** |

# Samanbering til upprunaliga kostnaðarætlan:

**Eystnes:**

| | Ætlan | Roknskapur | Munur |
|---|---|---|---|
| Enercon vindmyllur | 20.757.000 | 21.415.279 | 658.279 |
| Anlegg | 4.110.000 | 7.319.790 | 3.209.790 |
| Íbinding | 792.900 | 1.228.890 | 435.990 |
| Annar kostnaður | 120.000 | 154.142 | 34.142 |
| Renta | 1.000.000 | 634.174 | -365.826 |
| Dýrkandi viðurskifti | - | 848.455 | 848.455 |
| **Tilsamans Eystnes** | **26.779.900** | **31.600.730** | **4.820.830** |

**Vørðan:**

| | Ætlan | Roknskapur | Munur |
|---|---|---|---|
| Enercon vindmyllur | 14.843.000 | 15.218.632 | 375.632 |
| Anlegg | 2.236.000 | 2.293.271 | 57.271 |
| Íbinding | 364.640 | 586.388 | 221.748 |
| Annar kostnaður | 120.000 | 66.157 | -53.843 |
| Renta | - | 240.907 | 240.907 |
| Dýrkandi viðurskifti | - | - | - |
| **Tilsamans Vørðan** | **17.563.640** | **18.405.355** | **841.715** |

## Viðmerkingar til meirkostnaðir og annað:

### Eystnes:

Meirkostnaðurin fyri "anlegg" stavar í høvuðsheitum frá, at fundamentini gjørdust dýrari enn upprunaliga mett. Treytir til fundamentini koma aftaná boðfasuna, og hetta vildi verið galdandi fyri allar luttakarar, sum bjóðaðu. Útgangsstøðið í tilboði okkara var sama slag fundament, sum brúkt varð til Vestas vindmyllurnar. Tá ítøkiliga projekteringin fór í gongd, vísti tað seg, at ENERCON ikki góðtók hetta slag av fundamentum, men settu sum treyt, at ein av teirra egnu fundamentstypum bleiv brúkt. Sjálvt fundamentið gjørdist nærum tvífalt so dýrt sum upprunaliga ætlað, umframt ein munandi øktur kostnaður til ráðgeving, tí fleiri kanningar skuldu gerast, ið ikki var tikið hædd fyri.

Hartil kom ein øktur kostnaður fyri dagar, ið ikki var arbeiðandi vegna vánaligt veður. Upprunaliga var ætlanin, at vindmyllurnar skuldu setast upp í bestu summartíð, men grunda á at avgerðin hjá Elveitingareftirlitinum var kærd, dróg málið út og seinkaði hetta tískil verkætlanina so mikið nógv, at komi var langt út á heystið, áðrenn vindmyllurnar komu til landið. Hetta darvaði uppsetingini við tí úrsliti, at ENERCON kravdi eitt ávíst endurgjald fyri hetta.

Meirkostnaðurin fyri "íbinding" stavar í høvuðsheitum frá, at tað gjørdist nakað meira av hellu at brekka enn upprunaliga ætlað. Upprunaliga var eisini ætlanin, at íbindingarstaðið skuldi vera við sunnastu Vestas vindmylluna, men tá hendan fórst í illveðri, bleiv íbindingarstaðið broytt til at verða í transformarastøðini við mittastu Vestas vindmylluna, og hevði tað við sær eina væl longri kaðalføring.

Meirkostnaðurin vegna "dýrkandi viðurskifti" stavar frá breiðkan av vegnum við Agnið, asfaltering av vegnum út á Eystnes sambært endaligu byggitreytunum frá Nes kommunu, og hartil hoyrandi ráðgeving.

### Vørðan:

Roknskapurin fyri økið Vørðan tekur ikki hædd fyri, at SEV hevur fingið endurgjald fyri 2 Vestas-myllur, sum áður stóðu á hesum øki. Samlaða endurgjaldið er 6,0 mió. kr.

## ALMENT UM INNROKNING OG MÁTING

Allar útreiðslur og íløgur í samband við byggiroknskapin verða innroknaðar, so hvørt vøran ella tænastan er veitt. Kostnaður fer fram til kostprís.

Byggiroknskapurin tekur ikki við kostnað og møguligt endurgjald í samband við niðurtøku av eldri vindmyllum á økinum.

## GJALDOYRA

Byggiroknskapurin er gjørdur í donskum krónum.

Flytingar í fremmandum gjaldoyra í tíðarskeiðinum verða umroknaðar til kursin tann dagin, flytingin er gjørd. Kurstryggjaðar flytingar verða tó upptiknar til tann tryggjaða kursin.

## BYGGIROKNSKAPUR

### Enercon vindmyllur

Enercon vindmyllur umfatar sáttmálaásetta kostnaðin av vindmyllunum.

### Anlegg

Anlegg umfatar kostnað til vegagerð, fundamentir, vindmyllupláss og uppsetan av húsi til tekniska útgerð o.a. kostnað.

### Íbindingarkostnaður, annar kostnaður og rentur

Íbindingarkostnaður umfatar kaðalgrøv, kaðalar og annan kostnað. Rentukostnaður er roknaður út við støði í flowinum undir byggingini, við eini rentu uppá 4,5% p.a.

### Dýrkandi viðurskifti

Dýrkandi viðurskifti umfatar neyðugan meirkostnað, sum SEV ikki hevur møguleika fyri at sleppa undan. Hetta umfatar serliga kostnað í samband við breiðkan av vegi útyvir tað, sum áður er góðkent og avtalað.